FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Finance

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

Tórshavn, tann: 7. apríl 2022
J. nr.: 22/06490
Viðgjørt: AE

Svar til fyrispurning nr. 52-154/2021 frá Jóhannis Joensen, løgtingsmanni, settur landsstýrismanninum í fíggjarmálum, Una Rasmussen, um rørslutarnað og bussteðgistøð

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Hvussu gongur arbeiðið at gera bussteðgistøðini í Føroyum klár til nýtslu hjá rørslutarnaðum?

2. Er tað sambært lóg og reglum, at rørslutarnað ikki sleppa at koyra við Bygdaleiðum, um vindmegin er omanfyri 15 m/sek?

3. Er tað í lagi, at vit í Føroyum gera mun á borgarum eftir vindstyrki?

4. Ætlar landsstýrismaðurin at finna eina loysn, so allir borgarar eru javnsettir at nýta almennu bussleiðirnar?

Svar til spurning 1
Tað var eitt krav í sambandi við, at bussleiðin varð boðin út av nýggjum, og nýggir sáttmálar skuldu gerast við privatu busseigararnar (gjørdir í 2020), at rørslutarnað skuldu kunna nýta bussarnar, og bussarnir tessvegna skuldu hava lyftu.

Landsstýrismaðurin heitti í september 2021 á Strandfaraskip landsins og Landsverk um saman við kommunum at kanna umstøðurnar við bussteðgipláss og at gera eina ætlan fyri, hvussu bussteðgiplássini kunnu betrast við landsvegir, soleiðis at rørslutarnað skulu hava góðar umstøður at ferðast.

Landsverk og Strandferðslan hava samskift um málið, men er arbeiðið ikki farið í gongd.

Svar til spurning 2 og 3
Strandferðslan hevur ábyrgdina fyri, at ferðafólk kunnu ferðast trygt við bussum og skipum, at starvsfólk hava góðar arbeiðsumstøður, og at skaði ikki kemur á flutningsfør.

Vágametingar eru gjørdar av havnum og skipum, og hevur Strandferðslan eina trygdarætlan fyri busskoyring í ringum veðurlíkindum.

Eftirlit er við kringumstøðunum á øllum farleiðum á sjógvi og landi. Er til dømis ov nógvur vindur, tekur stovnurin altíð trygdina framum onnur atlit og avmarkar tænastur ella avlýsir ferðir á viðkomandi leiðum.

Strandferðslan vísir á, at nógv steðgipláss, har tað skal skiftast millum bussar, eru ov lítil og ikki vard móti vindi og regni. Tá ið rørslutarnað skulu flyta millum bussarnar, er tað ikki vandaleyst, og er onkur óheppin støða komin fyri.

Strandferðslan og bussfeløgini hava tí sett eitt trygdarmark fyri, nær tað er forsvarligt at ferðast. Miðal vindmegi omanfyri 15 m/sek er ásett sum mark, men tað verður mett út frá umstøðunum við steðgiplássið sum heild, um tað er forsvarligt at ferðast.

Samanumtikið er einki ásett í reglugerð hjá Strandferðsluni um avmarkingar hjá rørslutarnaðum at ferðast við bussleiðini. Strandferðslan kann gera nærri ásetingar um tað og eisini kanna, um tiltøk kunnu setast í verk at tryggja rørslutarnaðum betri atkomuviðurskifti.

Svar til spurning 4
Landsstýrismaðurin hevur, sum kunnugt, heitt á Strandfaraskip landsins og Landsverk um saman við kommununum at gera eina ætlan fyri, hvussu bussteðgiplássini kunnu betrast á høvuðsvegakervinum.

Stórur partur av vegakervinum er kommunalur, og hava Landsverk og kommunur samstarvað um bussteðgipláss, eitt nú um staðseting og tekniskar loysnir.

Landsstýrismaðurin ætlar at raðfesta málsøkið frammarlig og virka fyri, at neyðug játtan verður til endamálið, soleiðis at øll kunnu ferðast trygt og væl um alt landið.

Tinganes, 7. apríl 2022

Uni Rasmussen
Landsstýrismaður í fíggjarmálum